# Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu

Tórshavn, 11. november 2020

Deildin fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu hevur síðan 1989 kannað hugburð, atburð og vitan viðvíkjandi m.a. rúsevnum hjá næmingum í 9. flokki. Henda kanning er gjørd, sum ein partur av European School Survey Project on Alcohol and other Drugs (ESPAD), har millum 30 og 35 lond í Evropa luttóku árini 1995, 1999, 2003, 2007, 2011 og 2015. Seinasta kanningin fór fram á vári 2019, hesaferð saman við 35 øðrum londum. Tilfarið er nú skrivað saman í bók, sum verður almannakunngjørd 12. november, kl. 10:30 føroyska tíð, í øllum Evropa – almannakunngeringin er á netinum – sí: http://espad.org/.

**Um kanningina 2019 er stutt at siga:**

Kanningin bleiv gjørd í døgunum 5. mars til 4. apríl. Íalt luttóku 37 flokkar í 19 skúlum. Heili 511 ella 82% av øllum næmingum føddir í 2003, svaraðu spurningunum.

Allir næmingar í 9. flokki, sum vóru í skúla kanningardagin, fingu høvi at svara spurningunum. Kanningin var skipað soleiðis, at hon minti um próvtøku, tí næmingarnir sluppu ikki at tosa saman ella at samanbera svar. Ei heldur skuldu næmingarnir seta navn sítt á spurnablaðið, sum bleiv lagt í ein læstan kassa til hagfrøðiliga viðgerð á Deildini fyri Arbeiðs- og Almannaheilsu. Hetta tilfar er síðani sent okkara samstarvspørtum í ESPAD til hagfrøðiliga viðgerð og samanskriving í bók, har tað ber til at samanbera londini.

Í góðum samstarvi við skúlarnar í Suðri, so royndi vit fyri fyrstu ferð i 2019, at fáa næmingarnar at svara einum talgildum spurnablaðið. Hetta riggaði avbera væl.

Her skulu vit siga frá nøkrum av meginúrslitunum.

**Tubbaksroyking**

8,4% (10,2% í 2015) av dreingjunum og 5,4% (2,6% í 2015) av gentunum søgdu seg at hava roykt dagliga seinastu 30 dagarnar.
3,0%% (2,2% í 2015) av øllum næmingunum søgdu seg roykja dagliga, longu tá teir vóru 13 ára gamlir ella yngri.
18% (18,8% í 2015) høvdu roykt onkuntíð seinastu 30 dagarnar.

Brúka vit nakrar av undanfarnu kanningunum til samanberingar, síggja vit, at royking nú er minni enn nakrantíð millum hesi 15 ára gomlu: Í 1996 royktu 39% dagliga, í 1997 37%, í 1998 30%, í 1999 28%, í 2003 33%, 2007 21%, 2011 19% 2015 8% og í 2019 7%. Her hava vit øll árini brúkt sama spurning: ”Hvussu ofta hevur tú roykt sigarettir seinastu 30 dagarnar?”. Síðani eru hesir svarmøguleikarnir lagdir saman:

- 1-5 sigarettir um dagin
- 6-10 sigarettir um dagin
- 11-20 sigarettir um dagin
- Meira enn 20 sigarettir um dagin

**E-sigarettir**

Í 2015 og 2019 hava vit eisini spurt, um næmingarnir høvdu roynt e-sigarettir og teir svaraðu soleiðis:

| | Ja, seinastu 30 dagarnar | Ja, seinastu 12 mánaðirnar | Ja, meira enn 12 mánaðir síðan | Ongantíð |
|---|---|---|---|---|
| 2015: Hevur tú roynt roykt e-sigaretteir? | 8,9% | 22,7% | 12,3% | 56,1% |
| 2019: Hevur tú roynt roykt e-sigaretteir? | 8,4% | 23% | 18% | 61% |

**Rúsdrekka**

Sjúkrahúsverk Føroya
Sigmundargøta 5, FO-100 Tórshavn
Tlf.: +298 31 66 96, Fax: +298 31 97 08, T-postur: dfaa@health.fo

Seinastu 30 dagarnar søgdu 62% av næmingunum seg ikki hava smakkað rúsdrekka. Til samanberingar var hetta tal 62,3% í 2015.
Seinastu 30 dagarnar høvdu 13% drukkið seg fullan. Í 2015 var hetta tal 10,3%.

## Hassj

Seinastu 30 dagarnar søgdu 3,5% av næmingunum seg hava roynt hassj. Hetta tal var í 2015 1,2%.

## Sniffað

Seinastu 30 dagarnar høvdu 1,8% sniffað, t.d. lím og tendraragass. Í 2015 2,4%.

## Rúsevni annars í lívinum

| | 2019 | 2015 | 2011 | 2007 |
|---|---|---|---|---|
| Amfetamin: | 1,4% | 0,2% | 0,9% | 0,5% |
| LSD: | 1,2% | 0,4% | 0,4% | 0,5% |
| Crack: | 1,2% | 0,4% | 0,4% | 0,5% |
| Kokain: | 1,0% | 0,4% | 1,4% | 0,9% |
| Heroin: | 1,2% | 0,2% | 0,7% | 0,5% |
| Ecstasy: | 1,4% | 0,4% | 1,1% | 0,7% |
| Soppar: | 2,0% | 0,8% | 1,6% | 0,5% |

*Lágu tølini omanfyri eru á leið tey somu, sum í teimum undanfarnu kanningunum.*

## Niðurstøða

Samanbera vit rúsevnanýtsluna í Føroyum við hini londini í Evropa eru vit framvegis millum tey, sum hava minstu nýtsluna av rúsevnum. Tó skal sigast, at viðvíkjandi rúsdrekka liggja vit ikki í botninum í mun til hini londini – heili 13% av hesum ungu fólkunum søgdu seg hava drukkið seg full seinasta mánaðin. Hetta tal er voksið góð 3% kanningini í 2015, so mest sannlíkt er hetta ein veruligur heilsutrupulleiki millum ung.

Góðu tíðindini eru, at sigarettroyking er minkað stórliga millum tey ungu hesi seinastu 20 árini. Í 1996 roykt út við 40% dagliga og í 2019 bert 7%. Mest sannlíkt eigur miðvísa arbeiðið hjá Fólkaheilsuráðnum og SSP úti í skúlunum sín part av æruni fyri stóru minkingina. Tað er bert at vóna, at aðrar nikotinkeldur ikki koma í staðin fyri sigarettirnar, nevniliga snús og e-sigarettir.

Aftaná tíðindafundin verður ESPAD frágreiðingin tøk at taka niður á heimasíðuni hjá ESPAD: www.espad.org.